19.09.2024

Sum avtalað á eykaaðalfundinum, so er hetta eitt royndarár við niðanfyristandandi reglugerð. Reglugerðin verður tikin upp aftur á aðalfundinum í juni 2025.

---

Reglur viðvíkjandi Grandprix-kappingini - vaksin

§ 1 Kappingarsnið

stk. 1 Spældar verða í minsta lagi 5 kappingar, um til ber skipar hvørt felag fyri í minsta lagi einari kapping.

Feløgini kunnu sjálvi avgera navnið á kappingini - eitt nú "Trygd Open".

stk. 2 Kappingarnar verða lagdar eftir forritinum Cup 2000, sum BSF hevur keypt, og sum er ogn BSF´s.

stk. 3 Allar kappingarnar verða leiktar við innleiðandi bólkaspæli og eftirfylgjandi einum endaspæli. Til hvørja kapping verður ein vinnari funnin í øllum aldursbólkum og rekkjum.

stk. 4 Um kappingin skal geva stig, so skal kappingin vera í tráð við stk. 1-3 og §2.

stk. 5 Fimm tey fyrstu, í ávíkavist harra- og kvinnurekkjuni, fáa grandprix-stig eftir §3.

§2 Innbjóðing og avgreiðing av grandprixkappingum

stk. 1 Ábyrgdarhavandi felag syrgir fyri, at innbjóðingin verður gjørd sambært frymli frá BSF. Í innbjóðingini skal standa: tíð, stað, luttøkugjald, heiðursmerki, nær freistin at melda til er, hvør er kappingarleiðsla í høllini, hvør hevur ábyrgdina av at leggja kappingina, teldupostur og telefonnummar á kontaktpersóni í samband við avboð.

stk. 2 Leikararnir melda til hjá egnum felag, sum so sendur eina samlaða tilmelding fyri felagið til kappingarnevndina hjá BSF. Á tilmeldingarlistanum frá feløgunum til BSF skal standa: Navn, føðidato og føðiár, rekkja og aldursbólkur, har leikarin ynskir at luttaka í.

stk. 3 Tá ið freistin er farin verður latið aftur fyri tilmeldingunum, men tað er møguligt at sleppa á bíðilista, tó er ongin bíðilisti til A, tí at leikari skal vinna sær rættindi at spæla í A. , so til ber at luttaka, um okkurt avboð kemur. Tó er ongin bíðilisti til A, tí at leikari skal vinna sær rættindi at spæla í A.

stk. 4 Tveir, fýra ella fleiri leikarir verða undanskipaðir(seedaðir) eftir tal av tilmeldaðum. Undanskipanirnar verða tiknar við støði í ranglistastigunum, og er ájavnt í ranglistastigum ger kappingarnevndin í BSF av, hvussu undanskipanin verður. Til fyrsta GP verður endaligi ranglistin frá undanfarna ári brúktur til undanskipanina.

Aftaná, at ranglistastigini frá GP5, undanfarna ári, er brúkt til at leggja GP1 í inniverandi ári, verða allir leikarar nullstillaðir í bæði A og B.

stk. 5 BSF hevur ábyrgdina av, at ein kappingarskipan við vegleiðandi tíðum er á facebook-síðuni Badmintonsamband Føroya seinast 5 dagar undan kappingini.

stk. 6 Ábyrgdarhavandi felag skal alla kappingina hava eina kappingarleiðslu til staðar í høllini, sum hevur ábyrgdina av, at kappingin koyrir sambært kappingarreglunum, og at alt runt í høllini fyrigongur róliga.

stk. 7 Teljari við talvu skal vera á øllum banum. Ábyrgdarhavandi felag skal syrgja fyri, at so er.

stk. 8 Leikararnir hava sjálvir/sjálvar ábyrgdina av at kanna, um dómaraseðilin er rætt útfyltur,

vinnandi leikari letur dómaraseðilin til dómaraborðið.

§3 Luttøka

stk. 1 Grandprix-kappingin er fyri leikarar í feløgum undir BSF. Í A-rekkjuni hjá kvinnum og monnum, kunnu hægst 16 leikarar luttaka í hvørjari kapping.

Kappingarnevndin, saman við BSF, kann loyva gestaspælarum at luttaka. Ein gestaspælari er leikari, sum ikki hevur havt bústað í Føroyum seinastu 6 mðr, ella sum er farin uttanlands í lestrar- ella arbeiðsørindum. Gestaspælari, sum ikki er limur í felagi undir BSF, fær hvørki GP ella ranglistastig. Um gestaleikari luttekur í GP kapping, kann verða víkt frá luttakartalið á 16 í A bólkinum.

stk. 2 Leikarin skal vera fylt/-ur 15 ár fyri 1. januar í kappingarárinum kappingin verður hildin, fyri at sleppa at luttaka í kappingini fyri tey vaksnu. *(Hetta verður sett í gildi kappingarárið 2025/26 – inntil tá er aldursmarkið 13 ár)*

Stk. 3 Um ein leikari er ungdómsleikari skal hendan/hesin, umframt kravið í stk. 2, eisini luttaka í GP í U17A í somu kapping, fyri at luttaka í kappingini fyri tey vaksnu.

stk. 4 Landsliðsvenjarin kann geva undantaksloyvi (Wildcard) til spælara, sum vegna skaða, sjúku og líknandi, ella uppihald uttanlands, og tí ikki hevur havt møguleika at lúka krøvini. Við uppihald uttanlands verður eitt nú meint við at fjakka, eftirskúla uttanfyri Føroyar og tílíkt. Leikarar, sum koma uttanlanda frá, og eru limir í felagi undir BSF, fáa ranglistastig, men ikki GP-stig.

Stk. 5 Leikari í GP-vaksin skal í minsta lagi luttaka í 3 GP-kappingum í kappingarárinum, fyri at tað skal telja við í endaligu GP-støðuni ta kappingarárið.

Stk. 6 Leikari í C-rekkjuni fáa ikki ranglistastig.

§4 Stig fyri Grandprix

stk. 1 Aftaná hvørja kapping, sum verður hildin sambært §1-2, verða stig fyri grandprix givin.

stk. 2 Stig fyri grandprix verða givin til 5 teir bestu harrarnar og 5 tær bestu kvinnurnar, og verða tey givin soleiðis:

nr. 1 fyrsta pláss fær 50 stig

nr. 2 annað pláss fær 40 stig

nr. 3 triðja pláss fær 30 stig

nr. 4 fjórða pláss fær 20 stig

nr. 5 fimta pláss fær 10 stig

stk. 3 Í so fall, at leikarar enda á einum deildum 3. plássi - fær hvør leikari 30 stig. Sama er galdandi fyri 5. plássið.

stk. 4 Tá ið samlaða støðan er uppgjørd, telja bara 4 tær hægstu raðfestingarnar við.

stk. 5 Í so fall, at fleiri leikarir hava líka nógv stig, so vinnur tann leikarin, sum hevur flestar topplaseringar. Um so er, at tað framvegis er javnt, vinnur tann leikarin, sum hevur vunnið flest innanhýsis dystir. Er tað framvegis javnt, so vinnur tann leikarin, sum vann síðsta innanhýsis dystin.

stk. 6 BSF gevur heiðursmerki/steyp til 3 ovastu harrarnar og 3 ovastu kvinnurnar aftaná GP5.

§5 Skipan av stigum

stk. 1 BSF ger eina skipan út frá teimum ranglistastigunum, sum leikarin hevur vunnið sær.

stk. 2 Stigini verða brúkt til at stýra uppflyting til næstu rekkju og til undanskipan.

Stk. 3 Fyri at rykkja úr B-rekkjuni í A-rekkjuna skal leikari hava 50 ranglistastig. Upp- og niðurflyting verður eisini eftir §6, stk. 3.

§6 Uppflyting og niðurflyting

stk. 1 Hvørt ár, tá ið nýtt kappingarár byrjar, avger kappingarnevndin, aftaná fyrstu GP-kapping,

hvussu nógv stig verða kravd fyri uppflyting til hægri rekkju tað kappingarárið. Eru 16 leikarar í A rekkjuni, so skal leikari í B-rekkjuni havaí minsta lagi 50 ranglistastig, sí nærri útgreining í stk 3 § 6.

stk. 2 Tá ið ein leikari flytir upp, verða stigini nullstillaði fyri tann leikaran.

Stk. 3

Eru 16 leikarar í A-rekkjuni, so skal leikari í B-rekkjuni hava í minsta lagi 50 ranglistastig sambært stk 1 §6, og fleiri ranglistastig enn leikari í A-rekkjuni, og hava vunnið B rekkjuna fyri at flyta upp í A.

Tá B-leikari á hendan hátt flytur upp í A, skal tann leikarin við minst ranglistastigum í A flyta niður í B-rekkjuna. Hava leikarar í A líka nógv stig verður fyrst hugt at vunnum dystum, settum og síðani vunnum bóltum í kappingini. Er enn javnt, so verður lutakast um, hvør flytur upp.

Stk. 4 Tann, sum rykkir upp í A skal javnstillast í ranglistastigum við tann leikara, ið tá liggur niðast í stigum í A-bólkinum, tá tann, sum eigur at flyta niður í B er fluttur niður.

Fyrireikingararbeiði til reglurnar hjá BSF til Grandprix-kappingarnar og skipan av stigum hjá teimum vaksnu

Ad §5

Um 9-16 leikarir luttaka í A og B, verða stigini deild soleiðis:

A-rekkjan:

1. pláss: 98 stig

2. pláss: 73 stig

3. og 4. pláss: 44 stig

5. til 8. pláss: 26 stig

9. til 16. pláss: 13 stig

B-rekkjan:

1. pláss: 22 stig

2. pláss: 16 stig

3. og 4. pláss: 10 stig

5. til 8. pláss: 6 stig

9. til 16. pláss: 3 stig

17. til 20(24). pláss: 1 stig